SUNDA KOMMUNA

# Leys størv við Hvalvíkar skúla

**Lýst verður eftir lærara og stuðulsfólki skúlaárið 2008/2009**

- 1 tíðaravmarkað lærarastarv
- 1 starv sum stuðulsfólk til næming við serligum tørvi, 25 tímar um vikuna

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vil vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður í lærarastarvið, skal hava læraraútbúgving. Ynskiligt er, at viðkomandi kann undirvísa í smíð, ítrótti og svimjing.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður sum stuðulsfólk, hevur námsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving/starvsroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið sum stuðulsfólk verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við CV, avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 24. juni, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aslaug Olsen, skúlaleiðara, á telefon 422028 ella 772028.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hvalvíkar Skúla*
*Skúlavegur 1*
*430 Hvalvík*

**Hvalvíkar skúli** hevur komandi ár uml. 45 næmingar og 5 lærarar. Skúlin er ein 3-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.

# S T Ø R V
## í Fryskúlanum í Havn

**Søkt verður eftir tveimum námsfrøðingum til spennandi, nýskapandi størv komandi skúlaár, 2008-2009.**

Frískúlin í Havn er ein skúli, har næmingurin er í miðdeplinum.

Frískúlin er eitt stað, har næmingar læra og mennast. Frískúlin í Havn møtir barninum, har tað er menningarliga. Skúlin virkar fyri, at barnið, gjøgnum hóskandi virksemi í einum stimbrandi og tryggum umhvørvi, mennist og lærir og upplivir gleði í skúladegnum. Skúlin leggur dent á at skapa ein felagsskap, sermerktur av virðing og umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Grundhugsjónin og skúlabygnaðurin eru lýst í stuttum á heimasíðu okkara www.friskulin.org.

Frískúlin í Havn sameinir skúlagongd og frítíðarvirksemi. Lærarar og námsfrøðingar arbeiða saman at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri barnið sum heild.

Í løtuni eru 3 starvsfólk og 16 børn í 1.– 2. flokki í skúlanum. Skúlin veksur støðugt, og skúlaárið 2008-2009 verða umleið 30 næmingar í 1.–3. flokki.

Arbeitt verður bæði í toymi saman við hinum starvsfólkunum og sjálvstøðugt.

Søkt verður eftir námsfrøðingum til tvey fulltíðarstørv. Arbeiðstíðin er skiftandi. Frískúlin er opin frá kl. 7.50 til 16.45.

Umsøkjarar eiga at hava námsfrøðiliga útbúgving.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til Frískulan í seinasta lagi 26. juni 2008

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran, Sharon Weiss á telefon 22 86 53 ella 32 81 50.

**Frískúlin í Havn**
Undir Borgarhálsi 44
176 Velbastaður
tlf. 32 81 50

# Lýsing eftir pedagogum og hjálparfolki til Vípuna

3 pedagogar 30 tímar, og 2 hjálparfólk 30 tímar, at byrja 1.aug 2008, ella eftir nærri avtalu.

Vípan er ein integreraður stovnur við børnum í aldrinum frá 0-7 ár. Ein stova í aldrinum 0-4 ár og ein stova í aldrinum 4-7 ár.

Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**
- hvar náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og hvar spæl fyllir nógv
- hvar virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- við opinleika og einum jaligum hugburði
- við broytingum hvar tú hevur tína ávirkan
- hvar vit eru byrjaði at arbeiða við "Den integrerende baggrund"

**Vit vænta av tær:**
- At tú ert útbúgvin pedagogur/hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avrit av prógvum og viðmælum, skal verða stovninum í hendi, seinasta lagi 4.juli.2008.

**Vípan**
Vípuvegur 3 · 100 Tórshavn
Tlf. 317535 / 287535
bg-vipan@post.olivant.fo

# JØRÐ Á STRONDUM TIL SØLU

Við hesum verða tveir jarðarlutir, matr. nr 516, Strendur, lýstir til sølu. Jarðarlutirnir eru ávikavist 81,41 og 224,64 $m^2$ og liggja hvør sær. Til jarðarlutirnar hoyrir uttangarðsjørð, íalt 1 gl. og 10 skinn, í Heygshaga.

Áhugaði kunnu venda sær til Gunn Ellefsen, advokat, ge@lawfirm.fo tlf. 593040 ella til Evu Gudmundsen, skrivara, eg@lawfirm.fo, tlf 596621.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við